# Golden Harp – søgan um

**Í sløk níti ár ár hava fólk, sum hava ferðast fram við Hvalvíkini, sæð rovini av einum skipsvraki, sum øll hesi mongu ár hava stungið upp úr sjónum út fyri sandinum. Eingin núlivandi minnist hendingina, sum liggur aftanfyri hetta skipsbrot, og lítið er skrivað í søgubókunum um tilburðin – og um sluppina Golden Harp, sum Niels av Selatrað keypti úr Onglandi í 1903**



GOLDEN HARP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú nøkur orð skuldu skrivast um sundalagsstevnu, sum verður um vikuskiftið, setti eg mær fyri at skriva nakrar reglur um forvitnisligu vrakrestirnar, sum tað mesta av eini øld hava ligið út fyri sandinum í Hvalvík. At vrakið er av sluppini Golden Harp, vita mong, men eftir øllum at døma finst lítið av skrivligum tilfari um sjálva hendingina, tá sluppin sleit á fjørðinum, rak á land og gjørdist vrak.

Tá í tíðini høvdu skipini lítlan motor, og tí eydnaðist tað ikki monnum at toga skipið av aftur sandoyruni í Hvalvík.

> »… Maðurin, sum 26. februar í 1903 keypti Golden Harp úr Yarmouth í Onglandi, var Niels Juel Joensen, vanliga róptur Niels av Selatrað…«

Ein teirra, sum visti nokso fitt um skipið og hendingina at siga, var Eirikur Dam, sáli, sum búði í Streymnesi. Pápin var av Norðskála, mamman úr Kvívík. Eirikur doyði av sjúku 28. august í fjør, bert 58 ára gamal. Tá serlig tiltøk ella dagar vóru, plagdi hann at halda røður og fólk, sum lýddu á, fóru altíð ríkari til hús aftur.

Í onkrari útvarpssending, sum okkum ikki hevur eydnast at fáa hendur á, hevur Eirikur fyri fáum árum síðan havt stutta frásøgn um Golden Harp, sum sambært Pól á Kletti, blaðmanni, vanliga varð rópt Golden.

### Lítið er skrivað

Tey flestu, sum hava ferðast eftir landsvegnum í Hvalvík, hava varnast hetta skipsvrak, sum framvegis stingur væl upp úr sjónum á høgari fjøru. Bæði tilkomin og eldri vita at siga, at vrakið hevur ligið har alt tað, tey minnast, men tey fægstu vita nakað serligt um søguna aftanfyri skipið og skipsbrotið at siga.

Mánadagin í hesi vikuni tosaðu vit við ein 88 ára gamlan mann, sum býr í Sundalagnum, men hesin visti at kalla einki um Golden Harp. Hann mintist, at tá teir sum ungdómar settu gørn á Hvalvíkini, máttu teir ansa eftir, at teir ikki komu fastir í vrakið.

Vit hava eisini tosað við Arna Thorsteinsson, fornfrøðing og Ólav Øster, sum starvast á Føroya Fornminnasavni, men teir dugdu ikki at minnast, um nakað serligt er skrivað um skipsbrotið.

Báðir vóru teir góðir í ráðum, og Ólavur Øster var so beinasamur, at hann sama dag setti seg úti á Landsbókasavninum at leita gjøgnum Dimmalætting frá 1921, sum hann helt vera árið, tá hendingin fór fram á Hvalvíkini.

Men Ólavur fann onga søgu um Golden Harp í útgávum av Dimmalætting hetta árið.

### Mest um skiparar

Í Føroya Siglingasøgu hjá Páll J. Nolsøe er Golden Harp nevnd nakrar ferðir, men hetta er mest í samband við, hvør førdi sluppina – ella var við henni – ymisku árini, meðan hon var ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum.

Til ber at fylgja søguni frá tí, at sluppin verður keypt til Føroya úr Onglandi í 1903 til ein nólsoyingur, sum eitur Jan Jacobsen, førir skipið árini 1915 og 1916.

Tá eg leitaði á Landsbókasavninum mánadagin eftir tilfari um Golden Harp, fann eg í eini handavend ikki fram til skrivaðu søguna um skipsbrotið, sum helst er hent øðrumegin 1920.

Í tíðarritinum Frøði, sum Føroya Fróðskaparfelag gevur út, duttu vit á ein stuttan greinastubba um Golden Harp í útgávuni fyri apríl í 1994. Men eisini í hesi greinini stendur, at ikki hevur borið til at funnið meira tilfar um skipið – uttan tað, at sluppin lá uppankrað við streymneslandið, sleit í illveðri og rak inn á sandin í Hvalvík, har hon gjørdist vrak.

Og her hevur vrakið so ligið.

Frøði heldur, at skipsbrotið er hent onkuntíð beint fyri 1920, og tíðarritið veit eisini at siga, at ein partur av viðinum frá skipinum varð seldur á uppboði. Viðurin var sterkasta eik, og tí er ein partur av vrakinum til enn tann dag í dag. Óhugsandi er tí ikki, at onkur planki frá Golden Harp enn stendur onkustaðni í Hvalvík, heldur tíðarritið.

### Keypt úr Yarmouth

Maðurin, sum 26. februar í 1903 keypti Golden Harp úr Yarmouth í Onglandi, var Niels Juel Joensen, vanliga róptur Niels av Selatrað. Hann kom á Havnina við skipinum 9. mars sama ár.

Niels Juel hevði ført sluppina Sunbeam, sum Dánjal Johan Vilhelm, keypmaður, vanliga róptur Dánjal við Misá, hevði keypt úr Yarmouth í juli í 1901.

Í 1903 og 1904 førdi Niels Juel Golden Harp, men longu hin 8. apríl í 1903 – bert stutt eftir, at hann kom til Føroya við henni – hevði Niels selt tveir triðingar av sluppini til Poul Niclasen, bókhaldara í Havn.

Hin 8. mai í 1905 seldi hann sama manni so restina av skipinum, soleiðis at Poul Niclasen nú átti alt skipið.

Niels av Selatrað hevði danska konu, og tey fluttu niður til Danmarkar at búgva. Hann helt fram at sigla og eitt árið, hann var í enskari havn,